Foreldrafelagið
HEIM&SKÚLI

# *Ársfrágreiðing 2015-16*

Nevndin stóð øll fyri vali, men eingin bjóðaði seg til at stilla upp á aðalfundinum 18. apríl, so undanfarna nevndin játtaði øll at taka eitt ár afturat. Í nevndini eru: Annika Sølvará, Justin Philbrow, Mildrid á Lógv, Tordis E. Nielsen og Olgar S. Mortensen. Varaumboð eru Súsanna Bertholdsen, sum hevur luttikið í øllum arbeiði sum nevndarlimur.

Farna árið hevur verið merkt av, at nevndarlimirnir hava verið sera upptiknir, so tað hevur verið langt millum formligu nevndarfundirnar, sum altíð liggja í vikuskiftum. Bara ein veruligur fundur hevur verið. Hinvegin hevur nevndin samskift dúgliga, serliga í Facebook bólkinum hjá nevndini, men eisini við telduposti og telefon. Hetta hevur m.a. verið um fyrireiking av politiskum kjakfundi, um tíðindaskriv, um luttøku í arbeiðsbólkum og nevndum og líknandi .

Mál, sum nevndin setti sær fyri at arbeiða við í 2015-16:
- áhaldandi at byggja upp og styrkja sambandið við skúlastýrini umvegis teldupost og annars at samskifta umvegis heimasíðuna heimogskuli.fo og Facebook síðu okkara.
- at skipa fyri kjakfundi við valevnum til Løgtingsvalið fyri at fáa fokus á fólkaskúlan
- at hava beinleiðis samband og samskifti við Mentamálaráðið og aðrar avvarðandi partar um aktuell mál, her undir at luttaka í ymsum nevndum og ráðum vegna Heim & Skúla

## ***Samskifti***

### **Mentamálaráðið**
Nevndin hevði havt nakað av samskifti við MMR.

Eftir áheitan frá felagnum var nevndin á fundi við Rigmor Dam landsstýriskvinnu og umboð fyri fyrisitingina 16. februar. Høvuðsevnini vóru:
- Eftirmeting av skipan við skúlastýrum, her undir uppgávur og krøv til skúlastýrislimir, átøk í sambandi við rekrutering til skúlastýrisval i heyst og áseting av greiðari og javnari samsýningum fyri skúlastýrisarbeiðið. Her høvdu vit eitt gott prát og vóru boðin at koma við hugsanum felagsins um hesi viðurskifti, so Mentamálaráðið kann taka hetta við í arbeiðið at endurskoða fólkaskúlalógina, sum fer i gongd nú.
- Talgildar royndir. Hvat eru ætlanirnar hjá MMR yvirskipað og hvussu tryggjar MMR, at talgildar royndir kunnu gjøgnumførast uttan teknisku trupulleikarnar, sum hava verið seinni árini. MMR hevur sett nógva orku av til at fáa talgildu royndirnar at virka tekniskt og seinastu royndirnar eru góðar. Tað er eingin ivi um, at royndirnar fara at vera talgildar framyvir, her verður ikki bakkað. Eisini varð tosað helt fitt um royndir yvirhøvur, landsroyndir og Pisa, hvat endamálið er, hvat tær verða brúktar til og hvat tær kunnu brúkast til. Her er ein bólkur í gongd við arbeiðið at greina økið.
- Frídagar mitt í skúlaárinum. Nevndin heitti á MMR um at leggja felags skeiðsdagar betri og fyrr, so teir ikki órógva skúlagongdina, soleiðis sum teir hava gjørt í verandi skúlaárið. MMR lovaði at arbeiða við málinum.
- Næmingaávirkan í skúlunum. Nevndin heitti á MMR í enn størri mun at tryggja, at næmingar verða hoyrdir og tiknir við uppá ráð í øllum viðurskiftum skúlans, bæði tí teir hava krav uppá at verða hoyrdir, tí tað lærir teir demokratisku reglurnar og tí hetta fjøltáttar skúlan.  MMR lovaði at arbeiða við málinum.

Fylgt varð upp uppá fleiri mál, sum vit hava samskift við MMR um: Trivnaðarátøk, eftimeting av royndarverkætlanum og ynski um yvirskipaða mannagongd í sambandi við ávís álvarslig mál. Einki endaligt svar her.

Á fundinum umrøddu vit eisini fíggjarviðurskifti felagsins. Vilji tyktist vera at játta felagnum fasta stuðulsupphædd. Vit hava nú søkt MMR um eina fasta árliga játtan á 15.000 kr., tí vit ikki fáa kravt limagjald frá øllum skúlastýrum.

**Tórshavnar Kommuna**

Umboð fyri nevndina hevur nýliga verið á fundi við mentamálaleiðaran fyri Tórshavnar Kommunu. Kommunan ynskti at kunna felagið um ymisk átøk á skúlaøkinum, sum arbeitt verður við, at hoyra hvat felagið arbeiðir við og umrøða samstarvsmøguleikar. Talan var um ein sera áhugaverdan fund og vit hava vegna felagið gjørt greitt, at vit fegin vilja samskifta við Tórshavnar Kommunu um ymisk mál av felags áhuga.

***Fundir***

**Politiskur kjakfundur**
Í sambandi við, at Løgtingsval skuldi vera í november skipaði nevndin fyri fundi í Læraraskúlahøllini mánakvøldið 17. august. Evnið var framtíðar fólkaskúlin í Føroyum. Tvey umboð fyri hvønn politiskan flokk vóru boðin at greiða frá , hvussu tey og teirra flokkur hugsa at raðfesta og skipa fólkaskúlan komandi árini í mun til mennandi læruumhvørvi, undirvísingartilfar, næminga- og starvsfólkatrivnað, útbúgving og eftirútbúgving av lærarum.

Eftir áheitan syrgdu vit fyri, at fundurin varð stroymaður. Hetta kostaði rættiliga nógv, og felagið hevur ikki fígging til slíkt, men við góðari fíggjarligari hjálp frá Lærarafelagnum og Pedagogfelagnum bar hetta til.

Fundurin gekk sum heild væl, tó at tað neyvan kom so nógv nýtt á borðið. Umleið 130 fólk vóru til fundin og eini 90 fylgdu við stroymingini. Fundurin kann síggjast her á youtube
https://www.youtube.com/watch?v=w6MhFYcGJLc

**Arbeiði við trivnaðarkanning**
H&S hevur havt umboð í fylgibólkinum til arbeiðið at gera trivnaðarkanning í fólkaskúlanum, har sjóneykan varð sett á happing. Úrslitini av kanningini og ein frágreiðing vóru handað Bjørn Kalsø, landsstýrismanni, 8. mai og løgd fram á tíðindafundi. Mælt varð til, at MMR setti sær mál um at gera fleiri átøk at basa happing og økja um trivnaðin. Dømi um nøkur tílík vóru nevnd í álitinum.

MMR gjørdi av at fylgja nevndu uppskotunum til tilmæli, m.a. at gera ein faldara til allar næmingar, hvat happing er, um úrslit úr kanningini og hvat kann gerast fyri at steðga happing.

MMR skipaði eisini fyri trivnaðarráðstevnu við heitinum Vitan, veruleiki og visión - Skúlin sum slóðbrótari. Allir skúlaleiðarar og lærarar í fólkaskúlanum vóru bodnir við. Eftir áheitan frá H&S vóru skúlastýrislimir bodnir við. Okkum kunnugt vóru tað tó fá, sum vóru við. Gott 800 fólk vóru á ráðstevnuni í døgunum 12. og 13. november. AS hevði eina framløgu á ráðstevnuni vegna H&S, har dentur var á sjónarmið hjá H&S til, hvat ein góð trivnaðarætlan er og hvussu tað kann arbeiðast við henni. Framløgan sæst á heimasíðu felagsins.

H&S hevur roynt at sett fokus á hetta arbeiðið umvegis Facebook síðu okkara og við at luttaka í orðaskifti. AS hevur eisini vegna felagið tosað við Skúlablaðið og Kringvarpið um evnið.

**Hoyring í Mentanarnevnd Løgtingsins**

Umboð fyri felagið varð boðið á fund við Mentanarnevnd Løgtingsins 18. januar i sambandi við Løgtingsmál nr. 21/2015: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni.

Nevndin svaraði soleiðis: Vit meta ikki, at vit hava heimild at føra fram nøkur sjónarmið um hetta málið vegna felagið, tí hetta er ikki fevnt av okkara virkisøki. Nevndin metir ikki, at lógaruppskotið, sum er til umrøðu, á nakran hátt er fevnt av hesi uppgávu ella at avleiðingar av uppskotinum kunnu koma at ávirka hesa uppgávuna. Vit hava ikki aðrar viðmerkingar til hetta málið vegna felagið. Vit vilja við hesum formliga boða frá, at vit grundað á omanfyri nevnda ikki ynskja at koma á fund við nevndina um hetta málið.
Samstundis vilja vit gera vart við, at í málum, sum hava við fólkaskúlan og samskifti og samstarv millum heim og skúla at gera beinleiðis ella óbeinleiðis, vilja vit sera fegin koma at føra fram sjónarmið felagsins vegna skúlastýrini í Føroyum.

**Fólkaskúlaráðið**

Fólkaskúlaráðið varð eftir drúgvan steðg valt av nýggjum og hevði sín fyrsta og annan fund í juni 2015. Orsakað av valinum og stjórnarskiftinum kom stígur í aftur og Fólkaskúlaráðið hittist ikki aftur fyrr enn í februar. Nú er avtalað, at fundur skal vera á leið eina ferð um mánaðin. AS umboðar H&S, JP er varafólk.

**Eftirmetingar av fólkaskúlanum**

Umboð fyri felagið var á eftirmetingarfundi í Mentamálaráðnum í mai 2015 aftaná Landsroyndirnar. Endamálið var at hoyra skúlarnar um teirra hugsan, hvussu Landsroyndirnar høvdu gingið.

Umboð fyri felagið varð boðið á fund við ein arbeiðsbólk í Mentamálaráðnum í februar 2016. Arbeiðssetningurin hjá bólkinum er at hyggja at verandi eftirmetingum (Landsroyndir, ársroyndir, fráfaringarroyndir og Pisa) og meta um, hvussu royndarúrslitini kunnu:

1. verða ein nyttug hjálp í undirvísingini í teimum ávísu lærugreinunum
2. bøta um og styrkja frálæruna
3. nýtast sum almenn kunning til myndugleikar og almenningin
4. gerast meira atkomulig og nýtast í almennum granskingarhøpi
5. gerast ein nyttug kunning og fráboðan um støðuna í skúlunum sum heild

AS umboðaði felagið, har hon gjørdi vart við, at nevndin metir, at royndir sum Landsroyndir og Pisa ikki gagna einstaka næminginum uttan so, at samlaðu royndarúrslitini verða eftirmett og nýtt til arbeiðið at menna skúlaverkið. Kensla okkara í dag er, at hetta verður gjørt í alt ov lítlan mun. Tá eru royndirnar heldur skaðiligar, tí tær órógva og fylla nógv stóran part av skúlaárinum., uttan at vera brúktar til nakað. Hinvegin so metir nevndin, at úrslit frá royndum avgjørt kunnu vera við til at styrkja læringina hjá tí einstaka uppá sikt, um tilfarið verður brúkt rætt.

Arbeiðsbólkurin skal lata sítt álit til landsstýriskvinnuna í vár.

**Hoyringar**

Felagið hevur uppskot til lógarbroyting og kunngerð á sernámsfrøðiliga økinum til hoyringar. Uppskotini vóru send skúlastýrisumboðunum til møguligar viðmerkingar. Vit móttóku ongar viðmerkingar og høvdu ikki sjálvi nakað, so vit svaraðu ikki.

***Miðladekningur 2015-16***

**Skúlablaðið**

Felagið hevur havt grein í hvørjum blaði, 6 bløð um árið, sum eisini verða lagdar á FB síðu okkara.

Frá 2016 er plássið í blaðnum avmarkað, so vit koma framyvir bert av hava styttri stubbar og boð í blaðnum.

**Loftmiðlar og bløð**

Umboð fyri felagið hava fleiri ferðir verið í miðlunum um ymisk aktuell evni, bæði tá vit sjálvi hava sent okkurt tíðindaskrivið út og tá miðlar hava spurt um okkara hugsan.

Hava annars sent miðlunum ymiskt tilfar, sum eisini er lagt á heimasíðuna, og okkurt av hesum hevur verið lagt á portalar og prentað.

**Heimasíðan og Facebook**
Nevndin hevur leypandi lagt ymiskt aktuelt tilfar á FB síðu felagsins. Kunning um tiltøk, viðkomandi greinar um næmingar, læring, trivnað, KT o.s.fr. Endamálið er at eggja til kjak. Vit kunnu tó staðfesta at tað er rættiliga avmarkað við viðmerkingum ella spurningum

**Fyrispurningar**
Av og á stingast støður upp hjá skúlastýrum, og umboð venda sær til onkran í nevndini. Vit skráseta ikki hesar fyrispurningar, men svara eftir førimuni og taka mál upp, um vit meta, at tey eisini hava almennan áhuga.

vegna nevndina

Annika Sølvará, forkvinna